# DB lækkar framvegis

Tað gongur seint, men støðugt niður á bakka við partabrævakursunum hjá Danske Bank. Í dag fór kursurin niður um 34 krónur fyri fyrstu ferð í 12 ár. – Tað er støðan sum heild á fíggjarmarknaðinum ið ger, at partabrøvini hjá Danske Bank liggja har, tey liggja, sigur analytikarin Stig Nymann frá Gudme Raaschou Bank við danska blaðið Børsen. Hann heldur, at tað einasta, sum kann hjálpa kursunum hjá Danske Bank er stabilitetur í fíggjarsektorinum. Fæst hann, hevur bankin eisini eitt stórt kurspotetniali. – Koma vit hartil, at tað ikki longur verður neyðugt við ógvusligu niðurskrivingunum og tørvinum á nýggjum kapitali hjá fíggjarfyritøkunum, serliga í USA, so vænti eg, Danske Bank fer at merkja hetta positivt, sigur Stig Nymann. Hann roknar við, at leiðslan í Danske Bank við Peter Straarup á odda má hoyra nøkur beisk orð frá íleggjarunum, tá bankin mikudag seinnapart heldur vanliga ársaðalfundin.






– Vit hava altíð eini 10-12 sløg av granitti liggjandi, so fólk sjálvi kunnu velja tað slagið, tey vilja hava til eitt nú borðplátur, sigur Magnus Petersen.

Júst borðplátur saman við gravsteinum eru mest framleiddu grótlutirnir á virkinum. Og hóast tað er eitt føroyskt grótvirki, so er tað kortini eitt virki, sum framleiðir øll sløg av gróti.

Men hóast gravsteinar og borðplátur eru størsti parturin av framleiðsluni, so gera teir nógvar aðrar grótlutir á Grótvirkinum í Skopun.

– Vit hava maskinur, sum kunnu gera tað mesta. Sum til dømis at klæða bygningar við gróti, ið er ógvuliga vanligt at gera uttanlands, har teir vilja hava arkitoniskt væl frágingnar bygningar. Tað kunnu vit eisini gera úr føroyskum gróti við ymiskum yvirflatum, sigur Magnus Petersen.

Tað kann so verða viðgjørt á ymsan hátt, antin verða latið rátt, bert sagað, ella tað kann verða yvirflatu viðgjørt á ymsan hátt, til dømis polerað ella høgt.

– So vit kunnu gera tað, sum aðrir kunnu gera, og ofta meira enn tað, sigur Magnus Petersen.

## Doypifont í Hoyvík

Júst hetta við at klæða útveggirnar á einum bygningi var nakað, sum Grótvirkið í Skopun var spent upp á í sambandi við Hoyvíkar Kirkju.

– Vit bjóðaðu upp á at klæða Hoyvíkar Kirkju, og teir vóru sinnaðir at taka av tí tilboðnum, sum vit lótu. Tilboðið umfataði bert levering av tilfarinum og ikki uppseting, og tað, sum hendi, var, at tað gjørdist ov dýrt í uppseting, og tí gjørdist tann handilin ikki til nakað, sigur Magnus Petersen.

Tað vildi annars verið ein typisk uppgáva fyri eitt størri grótvirki, sum helst skal hava onkrar størri uppgávur.

– Vit framleiða annars umframt borðplátur og gravsteinar eisini gólv í vanligum flísum og í brotflísum, sum er sera væl umtókt. Vit framleiða skreytlutir, ja, alskyns lutir úr bæði førloyskum og útlendskum gróti, sigur Magnus Petersen.

Men hóast teir ikki fingu klædningin á Hoyvíkar Kirkju at levera, vórðu teir kortini ikki heilt við sviðusoð í sambandi við ta byggingina.

– Vit vóru sjálvandi sera áhugaðir í at fáa eina slíka bílegging, so vit bjóðaðu teimum, at um vit fingu hesa bíleggingina, so skuldu vit lata gera teimum doypifontin – sum Albert Isfeldt hevði teknað, ógvuliga hegnisliga við einari áttakantaðari súlu sum føti – sum gávu, sigur Magnus Petersen.

Tað endaði so við, at doypifonturn varð gjørdur á Grótvirkinum í Skopun úr massivum føroyskum gróti – tað mesta við maskinum, men finishið við hond – og seldur kirkjuni fyri ein ógvuliga sámiligan penga.

## Tøvurin verður verandi

Fyrrverandi sakførarin sigur, at tað hevur verið ein tung byrjan at bróta burtur úr nýggjum suðuri í Skopun.

– Tað tekur sína tíð at uppbyggja slíkt, so vit høvdu roknað við, at tey fyrstu árini ikki fóru at geva avlop. Tað hevur gingið betri og betri, men ikki nóg væl fyri eitt virki sum hetta, tí at vit kundu havt nógv fleiri fólk í arbeiði enn tey trý tændrini, sum ganga her, sigur Magnus Petersen.

So hevði virkið havt ivaleyst at gjørt, kundu teir verið tíggju mans til arbeiðis. Men tað er kanska ikki rætta tíðin at víðka um virksemið, nú ein altjóða kreppa herjar.

– Vit vita ikki reiðiliga enn, hvat kreppan merkir fyri okkum. Tað er spurningurin um, hvussu konjunkturkend okkara vøra er. Ein partur ávirkast ikki av hesum, meðan ein annar partur ger, so vit vita ikki, hvør avleiðingin verður fyri okkum, men verður minni bygt, so fer tað allarhelst eisini at merkjast hjá okkum. Hvussu hart ber ikki til at siga, men vit vóna tað besta, sigur Magnus Petersen.

Men hóast fíggjarkreppu roknar stjórin framhaldandi við, at tað verður brúk fyri einum grótvirki í Føroyum.

– Vit rokna við, at tað framhaldandi fer at bera til. Tú kanst eisini tala eina kreppu í gongd, og hon hevur eftir mínum tykki ikki rakt Føroyar so hart, sum hon hevur rakt onnur lond. Hvussu tað verður seinni við fiskaprísum og øðrum ber sjálvandi ikki til at siga, heldur Magnus Petersen.

Hann heldur tað verða vónleyst at gera seg til spámann fyri framtíðina.

– Vit mugu bara halda fram at arbeiða og vóna, at tað framvegis verður onkur so skilagóður at keypa føroyska framleiðslu. Eru vit kapingarførir – og tað halda vit okkum vera – so skuldi framvegis verið pláss fyri einum grótvirki í Føroyum, sigu Magnus Petersen, stjóri á Grótvirkinum í Skopun.



*Gravsteinar er ein av heilt stóru framleiðslunum hjá Grótvirkinum í Skopun og samstundis ein framleiðsla, sum ikki er so ógvuliga tengd at konjunktursveiggjunum 9*



*Bárður Olsen er útlærdur gróthøggari. Her arbeiðir hann við eina av poleringsmaskinunum á virkinum*